## Vindferð 335 km/t

Tað er so nógvur vindur í ódnini Nida, sum hevur tikið seg upp har vesturi í Kyrrahavinum, at talan er um eina ta mestu vindferðina, sum veðurfrøðingar vita um at siga. NASA sigur, at meðalvindferðin í Nida er 270 kilometrar um tíman, og at í hvirlunum kemur vindferðin upp í 335 kilometrar um tíman. Enn er kortini einki, sum bendir á, at Nida fer at bera við land nakrastaðni. Mesta vindferð, sum er skrásett, var sambært NASA í 1979, tá vindferðin í ódnini Tip kom upp í 305 kilometrar um tíman í hvirlunum. Meðalvindferðin í teirri ódnini var 260 kilometrar um tíman.



## Skjóta 6.000 kamelar

Myndugleikarnir í Avstralia hava gjørt av at skjóta 6.000 kamelar, sum hava herjað ein bý í seinastuni. Fyrst skulu tyrlur reka kamelarnar út í eitt oyðið øki, har teir so skulu skjótast. Myndugleikarnir siga, at tað er áhaldandi turkur, sum hevur fingið teir nógvu kamelarnar at leita sær inn í bygt øki eftir vatni og mati. Kamelarnir hava verið ein plága fyri fólkið í økinum, og tey taka undir við avgerðini hjá myndugleikunum, sigur ABC News. Teir avstralsku kamelarnir verða meiri enn tveir metrar til hæddar, og teir størstu viga næstan eitt tons, so hetta er eingin gestur at fáa í urtagarðin.

# Nýggjur krimi høvundur gevur út




TÍÐINDASKRIV

Krimiskaldsøgan "Gagnligt lív" verður framløgd í Miðlahúsinum í næstu viku

Mikudagin 2. desember kl. 16 verður nýggja skaldsøgan Gagnligt lív eftir William Smith alment løgd fram í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

William er føddur í Vági í 1945, og starvast sum smittuverjufrøðingur á Landssjúkrahúsinum. Høvndurin hevur 40 ára starvsroyndir í sjúkrahúsverkinum, meginpartin av tíðini í Danmark, men eisini í Miðeystri og í Føroyum.

Í skaldsøguni letur høvundurin privatsjúkrahúsið Vita Hospital, ið er umbygda hvalastøðin við Áir, vera savningardepil fyri eirindarleysum og kyniskum handli við lívgøgnum frá rændum børnum. Høvuðsevni í bókini er ránnýtsla av lívgøgnum, ið fer fram kring stóran part av heiminum. Men spurningurin um transplantatión av lívgøgnum, sum etiskt-moralskt fyribrigdi, gongur sum reyður tráður ígjøgnum skaldsøguna.

Hendingarnar í 'Gagnligt lív' fara fram í Føroyum, Danmark, Sri Lanka og í India.

Á framløgudegnum verður brot lisið upp úr søguni, tónleikur verður framførdur og eitthvørt verður at leska seg við.

Skaldsøgan Gagnligt lív verður útgivin bæði á føroyskum og donskum, og nevnist á donskum Organiseret liv. Forlagið í Støplum gevur bøkurnar út.

# Jólahugni í Viðarlundini

Sum vanligt, skipar Lions Club Tórshavn fyri jólahugna í Viðarlundini í Havn sunnudagin millum klokkan 14 og 16.30

Umframt okkurt gott til góman, kunnu fólk ogna sær eitt nú jóladekoratiónir – og samstundis stuðla vælgerandi arbeiði

Árligi jólahugnin er hjá mongum startskotið til jólastákanina, ið setur sín dám á adventina, og aftur í ár er talan um eitt hálvantriðja tíma langt tiltak, ið plagar at verða væl vitjað. Lagt verður til brots klokkan 14 og hildið fram til klokkan 16.30.

Endamálið við tiltakinum, sum Lions Club Tórshavn skipar fyri, er at útvega pening til vælgerandi endamál, og tað verður gjørt við ymsari sølu á staðnum. Millum annað ber til at keypa sær kakao, bollar, vaflur, mandarinir og sunkist, og eisini eru jóladekoratiónir, brenni og tilfar til dekoratiónir at fáa.

Økið verður pyntað við ljósketum, bál verður tendrað og livandi ljós fara at standa fram við ánni, so hugnin er í hásæti. Ikki minst, tí Havnar hornorkestur eisini setur sín dám á løtuna við jólaligum horntónleiki, og eisini tá jólamaðurin gevur sær stundir at vitja – og sjálvandi við onkrum góðum í posanum til børnini!

Tiltakið hevur verið fastur táttur síðstu gott og væl 20 árini, og hvørja ferð hevur Lions Club Tórshavn í góðum samstarvi við Skógrøkt Landsins fingið skapt góðan jólahugna í Viðarlundini henda seinnapartin, so øll kunnu fáa best hugsandi byrjanina upp á adventina og komandi jólatíðina, samstundis sum tey stuðla vælgerandi arbeiði.

# Nýtt barnaráð valt í Húsinum í Klaksvík




Mikudagin 25. november 2009 skipaði Húsið fyri vali av nýggjum barnaráði, sum nú er mannað av Regini Høgnesen, Angelu C. Mathisen og Kristiani Linklett. Tiltakslimir eru: Leivur Ellingsgaard og Emilia Zachariassen.

Heimasíðan hjá Húsinum, www.husid.fo, skrivar, at íalt 33 børn vóru á vali hesaferð. Tá ið valúrslitið fyrilá, vórðu boð send eftir Jógvani Skorheim, mentanarnevndarformanni, sum kom á vitjan og kunngjørdi úrslitið. Inn komu Regin Høgnesen, Angela C. Mathisen og Kristian Linklett. Tiltakslimir eru: Leivur Ellingsgaard og Emilia Zachariassen. Ráðið skipar seg komandi mánadag. Skipanin við barnaráði í Húsinum hevur nú verið roynd í eina tíð, og Húsið skrivar á heimasíðuni, at hetta hevur riggað óføra væl. Barnaráðið, sum er fyri tey frá 3. flokki til og við 7. flokk, hevur til endamáls, at tey ungu sjálvi fáa møguleika til at seta dám á tiltøkini og umhvørvið í Húsinum. Í samband við valini hesaferð hevur Húsið eisini havt vitjan av Jancy Klein, sosialdeildarleiðara, og Jógvan Skorheim, mentanarnevndarformanni, sum greiddu teimum ungu eitt sindur frá, hví barnaráðið hevur týdning. Øll eru hjartaliga vælkomin at stilla upp, og uppstillingarlistar lógu frammi í Húsinum undan valinum, har tey ungu kundu seta seg á lista við at venda tær til eitt av starvsfólkunum. Sigast má, at áhugin var rættiliga stórur, tí ikki færri enn 15 børn stillaðu upp. Eisini varð skipað fyri pallborðsfundi millum tey uppstilladu, har tey fingu høvi til at siga frá, hvørjum tey ætla at arbeiða fyri.

# Prísbroytingar skulu fráboðast beinleiðis

**Brúkaraumboðsmaðurin hevur staðfest, at tað ikki er nóg mikið við lýsingum, tá príshækkingar verða framdar á fastar veitingar**

Fyrr í ár hækkaði Televarpið gjaldið við kr. 40 um hálvárið - frá kr. 190 til kr. 230. Hækkingin varð fráboðað tann 30. apríl 2009 á heimasíðuni hjá Televarpinum og á kunningarrás felagsins Rás 1 umframt í lýsingum í bløðunum. Hækkingin kom í gildi tann 1. juni 2009.

Sambært lógini um góðan marknarføringssið er Brúkaraumboðið komið til ta niðurstøðu, at fráboðanin hjá Televarpinum um hækking í kortleiguni ikki var nøktandi, hóast lýst hevur verið á heimasíðu felagsins umframt á Rás 1 og í lýsingum í bløðunum. Fráboðanin var bara ikki nóg sjónlig í lýsingunum, tí talan var um sølulýsing, har ið prísurin verður nevndur. Talan var tí ikki um eina týðuliga og greiða fráboðan um kortleiguhækkan til brúkaran.

Sambært § 15, stk. 3 í marknaðarføringarlógini, so skulu munandi broytingar fráboðast við individuellum samskifti, áðrenn broytingin fær virknað, og í fráboðani skal eisini verða sagt frá, um og á hvønn hátt brúkarin kann uppsiga avtaluna, áðrenn hon fær virknað.

Televarpið hevur tikið niðurstøðuna hjá Brúkaraumboðnum til eftirtektar, og hevur givið tilsøgn um, at komandi hækkingar ella broytingar verða kunngjørdar sjónligari í teimum føroysku bløðunum. Brúkaraumboðið ger ikki meir við hetta mál.